## Holst skoraði men tapti

Føroyski landsliðsleikarin skoraði fyrsta málið í dystinum móti FC Nordsjælland í gjár. Christian Lamhauge Holst stóð við handaru stong, tá bólturin fall fyri hansara føtur og tað takkaði hann fyri við at skora. Málið fall í tíggjunda minutti og var tað tíggjunda hjá Holst í deildini í ár. FC Nordsjælland megnaði at javna, tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin og í seinna hálvleiki gjørdu teir trý aftrat, soleiðis at endaliga støðan bleiv 4-1. Tapið í gjár staðfestir støðuna hjá Silkeborg, sum hevur trupulleikar við at vinna stig fyri tíðina. Seinastu fimm dystirnar er tað ikki vorðið til meira enn tvey stig. Hesar dystirnar hava teir latið 14 mál í gjøgnum, av teimum eru átta farin í gjøgnum í báðar síðstu dystirnar.




# Mistøkini kostaðu dýrt

**VODAFONEDEILDIN** Fuglfirðingar hava bert sær sjálvum at takka, fyri bert at fáa javnleik móti B71. Misnýttir málmøguleikar og mistakið hjá Jákupi Mikkelsen í ÍF málinum gjørdu sítt til, at B71 kundi fara suður aftur til Sands við einum stigi í skjáttuni, eftir at hava leikt javnt 1-1 í Fuglafirði

Ólavur Øre Hansen

| | |
|---|---|
| ÍF | 1 |
| B71 | 1 |

Tað er eingin ivi um at frøin er stór í B71 leguni, eftir at hava fingið eitt »heppið« stig í trupla útidystinum í Fuglafirði. Ikki tí, einki skal takast frá sandoyingum, teir stríddust manniliga í einum dysti, har teir til tíðir vóru undir stórum trýsti. Fuglfirðingar hava hinvegin alla orsøk at iðra seg um úrslitið. Eitt er at leika javnt móti B71 á heimavølli, tað kann altíð henda. Men tað er meira hvussu tað hendi, sum er orsøkin.

### Einvegis ferðsla

Fyrri hálvleikur var í stóran mun einvegis ferðsla móti málinum hjá sandoyingum. B71 hevði stórar trupulleikar av álopssinnaðu fuglfirðingunum, og fingu ikki glið á egið spæl. Gestirnir høvdu nokk við at sparka bóltin burtur av vandaleið. Hóast ÍF hevði fleiri sera góðar málmøguleikar í fyrra hálvleiki, so skuldu tað ganga 42. minuttir áðrenn tað bragdaði hjá heimaliðnum. Sum so ofta áður, var tað Rógvi Jacobsen, ið skoraði fyri ÍF, tá hann var hægstur og stútaði bóltin í netið, eftir innlegg úr høgru síðu. Fleiri mál komu ikki í fyrra hálvleiki. Tískil kundu fuglfirðingar fara til hálvleiks við eini 1-0 leiðslu, sum var fult í trá við dystargongdina.

### Dýrt mistak

Seinni hálvleikur var bert tveir minuttir gamal, tá Símun Hansen javnaði fyri B71 við einum langskoti. Hóast skotroyndin als ikki vandamikil, so misti Jákup Mikkelsen bóltin inn um málstrikuna. Eitt mál sum fyrrverandi landsliðsmálverjin avgjørt noyðist at taka á sín kappa.



**MISTØK**

*Her var Rógvi Jacobsen ikki hægstur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hetta var sum at fáa vátan vøtt í høvdið hjá fuglfirðingum, meðan sandoyingar fingu blóð á tonna.

Símun Hansen, sum var fluttur aftur á miðvøllin at leika, var eygsýndur, og dugdi hann væl at breiða spælið hjá gestunum út. Hetta hevði við sær at B71 kom betur við í dystin, og komu fram til onkran góðan málmøguleika. ÍF hinvegin, hevði trupult at finna stevið frá fyrra hálvleiki.

Men sum seinri hálvleikur leið, tók ÍF meira og meira yvir, og løgdu eitt ávíst trýst á mótstøðuliðið. Hetta hevði við sær at vertirnir komu fram til fleiri sera góðar málmøguleikar síðstu løtuna. Eitt nú brast ein skotroynd frá Rógva Jacobsen á stongina, men inn vildi bólturin ikki.

Sostatt endaði dysturin við javnleiki 1-1. Eitt úrslit sum sandoyingar nokk eru betri nøgdir við, meðan fuglfirðingar bert kunnu iðra seg um kostbaru mistøkini, bæði í álopi og í verju.

hansenolavur@hotmail.com

## Umráðandi at fáa stig



- Tað er altíð stuttligt at skora mál, sigur málskjúttin hjá B71, Símun Hansen, og heldur fram, - at tað er meira umráðandi at B71 fær stig í sínum dystum, og so ger tað minni hvør skorar málini.

-Sum heild eru eg sera væl nøgdur við avrikið hjá okkum í dag, sigur Símun Hansen, og vísir á at í fyrra hálvleiki vóru B71 undir einum stórum trýsti, men mentust nógv í seinra hálvleiki, har teir leiktu fult upp við ÍF.

Spurdur um útjavnandi máli hjá B71, ásannar Símun Hansen at tað var eitt løgið og heppið mál. Men sum uppflytari taka vit alt við sum vit kunna. Símun Hansen metir at javnleikurin móti ÍF hevur týdning fyri komandi dystirnar.

- Nú hava vit fingið stig í tveimum útidystum, so tað er tíð uppá at vit eisini byrja at taka stig á heimavølli. Komandi dysturin hjá B71 verður móti hinum uppflytaranum úr FC Suðuroy.